# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo






Volvo P1800 kom á marknaðin fyri 50 árum síðan

# VOLVO LEGENDA 50 ÁR

Á heimsins størstu innandura framsýning av klassiskum bilum hátíðarhildu Volvo, at 50 ár eru liðin síðan Volvo P1800 sá dagsins ljós í 1961.

Tað var á framsýningini Techno Classica í Essen í Týsklandi, sum var frá 30. marts til og við 3. april, at Volvo hátíðarhildu 50 ára føðingardagin hjá P1800.

P1800 varð teknaður hjá italska designaranum Frua í Torino í samstarvi við svenska Pelle Pettersson, sum var designari hjá Volvo tá og var til staðar á framsýningini í Essen.

Volvo P1800, ið varð gjørdur frá 1961 til 1973 og framleiddur í umleið 40.000 eindum, er vorðin ein legenda í altjóða bilasøguni.




*Toyota var mest selda bilmerki fyrsta ársfjórðing 2011*

# Toyota á odda

Hagtølini hjá Akstovuni vísa at sølan av nýggjum persónbilum stendur í stað í mun til fyrsta ársfjórðing í fjør.

Nú fyrsti ársfjórðingurin er farin av 2011, vísa hagtølini, at sølan av nýggjum persónbilum stendur í stað í mun til fyrsta ársfjórðing í fjør. Í ár vórðu seldir 167 persónbilar í mun til 169 í fjør. Sølan av vørubilum er ikki stór, men hon er tó vaksin við 35 prosentum úr 17 upp í 23 bilar.

Sambært hagtølunum er Toyota er mest selda bilmerki higartil í ár við 48 bilum, Citroën er nummar tvey við 26 bilum og Ford er nummar trý við 20 bilum. Samlaði vøksturin av nýggjum akførum er 5,6 prosent.

## Hósdagin 7. apríl kl. 17.10

Í sendingini verður vitjað hjá Faroe Ship í Havn, har prátað verður við stjóran Jóhannu á Bergi og onnur starvsfólk um virksemið hjá felagnum, sum rekur flutnings- og logistiktænastur í sambandi við innflutning og útflutning, skundflutning (Faroe Express), innlendisflutning, eins og frysti- og vørugoymslur og skipaumboðan.



Jóhanna á Bergi

Vinnu- & bílradio á Rás 2